# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Vit arbeiða í fullari ferð við at finna eina meira varandi loysn. Nær hendan kann gerast endalig, vita vit ikki, men vónandi verður tað fyrsta dagin*

*Eyðun Dalsgarð, AB-formaður*

## Santos royndarvenur hjá Fremad Amager

**Brasilski bakkurin hjá B36 verður hesa vikuna í danska høvuðsstaðnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er neyvan nakar ivi um, at Santos seinnu árini hevur verið besti vinstri bakkurin í føroysku fótbóltslandskappingini. Áðrenn hann kom til B36, var hann hjá Frem í donsku 1. deild, og nú hyggur Fremad Amager so eftir, hvørt talan er um spælara, sum teir vilja knýta at felagnum til komandi kappingarár.

Hesa vikuna er Santos til royndarvenjingar hjá danska felagnum.

Kristjan á Neystabø, stjóri í FC Tórshavn, sigur, at teir í løtuni ikki arbeiða við nøkrum spælara, sum skal koma í hópin fyri Santos.

- Vit hava eina avtalu við Alex, har hann skuldi fáa møguleika at royndarvenja uttanlands. Skuldi tað verða, so er just hendan vikan tann rætta fyri okkara viðkomandi. Við UEFA-Cup uppgávunum fyri framman, verður talan als ikki um summarsteðg hjá okkum, og tí hava vit valt at taka okkum av løttum hesa vikuna. Hvat spyrst burtur úr royndarvenjingini vita vit ikki, men her og nú fara vit so ikki at leita okkum eftir styrki, sigur Kristjan á Neystabø.



*Alex José dos Santos venur hesa vikuna við hópinum hjá Fremad Amager*
*Mynd: Álvur*

## Fremadvenjarin er byrjaður

**Í gjár byrjaði Jakob Friis-Hansen í Fremad Amager, har fyrsti setningurin verður at halda plássinum í deildini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ætlandi skuldi Friis-Hansen ikki byrja fyrr enn komandi kappingarár, men nú er so avtala gjørd millum Fremad og HIK um, at at nýggi venjarin byrjar alt fyri eitt. Síðani tað gjørdist greitt, at nýggjur venjari varð settir, hevur Fremad tapt tríggjar dystir á rað, og í løtuni eru teir beint undir niðurflytingarstrikuni. Hartil tykist nú greitt, at Peer F. Hansen, sum hevur verið venjari hjá Fremad Amager, nú fer í nýtt starv hjá Brøndby.

Fyrst og fremst man tað tó vera ítróttarliga gongdin, sum hevur verið atvoldtil, at venjaraskiftið verður framt longu nú.

Saman við Jakob Friis-Hansen kemur eisini Peter Rasmussen, sum hevur verið servenjari hjá danska landsliðnum, umframt at hann hevur verið hjálparvenjari hjá HIK. Fyrsti setningurin hjá teimum verður heimadysturin móti Aarhus Fremad, sum við 25 stigum er eitt stig framman fyri Fremad Amager á talvuni. Hartil eru dystir móti AB, Herfølge og SønderjyskE eftir á skránni.



## Tvey 10-mannafør á norðoyastevnu

Einans Vestmenningur hevur hug at bjóða Eysturoyingi av í 10-mannafarsróðrinum á norðoyastevnu. Aðrir bólkar eru tó væl umboðaðir, og eru manningarnar til samans 45 í tali. Hartil kemur barnaróðurin, sum verður rógvin áðrenn FM-róðrarnir. Hesir byrja annars klokkan 13. Nú talan er um fyrsta róðurin á árinum, er lutur kastaður um, hvussu startrøðin verður, og er startrøðing hendan.

**5-mannafør dreingir**
5 Jómfrúgvin
6 Sílið
7 Blikur
8 Havfrúgvin
9 Erla Kongsdóttir
10 Teistin
11 Jallurin
12 Tjaldrið

**5-mannafør kvinnur**
4 Fípan Fagra
5 Jallurin
6 Teistin
7 Frúgvin
8 Ørnin
9 Sílið
10 Kollur
11 Blikur
12 Ritan
13 Erla Kongsdóttir

**6-mannafør kvinnur**
7 Fortuna
8 Tvøråbáturin
9 Kollfirðingur
10 Jarnbardur

**5-mannafør gentur**
5 Ørnin
6 Tambar
7 Teistin
8 Hvassi
9 Drekin
10 Blikur
11 Havfrúgvin
12 Jómfrúgvin

**6-mannafør menn**
5 Riddarin
6 Smyril
7 Lómur
8 Tvøråbáturin
9 Rádni
10 Jarnbardur
11 Sundabáturin
12 Strálan

**8-mannafør**
7 Heiðabáturin
8 Argjabáturin
9 Árnfirðingur
10 Ørvur
11 Knørrur

**10-mannafør**
8 Eysturoyingur
9 Vestmenningur